# Jógvan Hugo Gardar

*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
– Vit vera heima í Oslo á jólum. Síðani vit fingu børn hava vit verið við hús á jólum. Tað er langt at ferðast til ommur og abbar í báðar ættir, og skulu vit sleppa undan at standa í langum bíðirøðum til flogfør ella tok, so er best heima.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
– Jólaaftan hava vit lambasteik, meðan tann norski rætturin "ribbe" (rivjasteik) kemur á borðið fyrsta jóladag. Og hetta hava vit gjørt til fastan tátt.

*Hvat er tað besta við jólum?*
– Friðurin. Tað er ein vælsignaður friður, her vit búgva mitt í Oslo. Vanliga búgva um 600 familjur í íbúðarblokkøkinum, og uttanfyri koyra 10.000-tals bilar hvørt einasta døgn. Á jólum eru vit nærum einsamøll – grannarnir standa í bíðirøð onkrastaðni, kanska í somu røð sum bilarnir og bíða eftir at sleppa fram onkrastaðni uppi í norska fjallaheiminum. Í Oslo er friður.

*Hvat er minni gott við jólum?*
– Alt rokilsi vikurnar undan sjálvum jóladøgunum.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
– Seinastu 16 árini havi eg hildið jól uttanlands.

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
– Eg klári meg gott uttan jólatónleik, men um eg skal velja, so má tað vera "Happy Xmas (War is Over)" hjá John Lennon og Yoko Ono.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
– Eina góða bók ella eina góða fløgu.





















